# Stuðulskonsert við Michalu Petri

Eirikur Lindenskov


*Heimskendi blokkfloytuspælarin, Michala Petri, fer at spæla til stuðulskonerstina í Hoyvíkar kirkju*

Sunnudagin 30. januar klokkan 16 verður stórfingin konsert í Hoyvíkar kirkju við heimskenda blokkfloytuspælaranum Michalu Petri, ið fer at spæla saman við føroysku tónleikarunum Jóhannes Andreasen á cembalo, Nikolaos Kapnas á bratsj og Jens Christian Guttesen á cello.

Spæld verða verk eftir Handel, Telemann, Tartini, Vivaldi, W. Heinesen, og Petri.

Konsertin verður hildin til frama fyri nýggja urgu í kirkjuni, væntandi um nøkur ár.

Michala Petri hevur spælt konsertir í øllum heimspørtum, frá tí hon var tannáringur. Hon hevur eisini spælt fleiri ferðir í Føroyum, har hon hevur familju.

Jóhannes Andreasen, Nikolaos Kapnas og Jens Christian Guttesen eru allir musikklærarar og útynnandi tónleikarar. Teir hava medvirkað sum solistar, kórleiðarar, kamar- og symfoniskir tónleikarar í mong ár.

Konsertin er ókeypis. Tónleikararnir spæla allir uttan samsýning, men høvi verður hjá fólki at geva eina gávu. Innsavnaði peningurin fer óskerdur í ein nýggjan orgulgrunn hjá kirkjuni.

*eirikur@sosialurin.fo*


*Oddvør Johansen við urguna í Hoyvíkar kirkju. Elstu lutirnir í urguni eru 90 ára gamlir*

## Fakta

Tann verandi pípuurgan í kirkjuni varð keypt brúkt, fasadupípurnar eru tó nýggjar. Elstu lutirnir í urguni eru meir enn hálvfems ára gamlir, og sjálvt »vindhúsið« er frá 1942. Urgan virkar og ljóðar væl, men hevur einans 8 røddir og eittans manual. Í longdini er hetta ov lítið, við tað at meginparturin av orgullitteraturinum er skrivaður fyri í minsta lagi tvey manual.


LÆRLINGUR

Søkt verður eftir HVS Lærlingi til

**pf Maria Poulsen**

Vit vænta at tú ert raskur/røsk og Fyrikomandi. Koyrikort er Eitt krav.

Ert tú tann rætti persónurin, ert tú vælkomin at senda eina umsókn. Til ap@mp.fo
Umsóknin skal vera okkum í hendi innan 14.02.2011

**P/F Maria Poulsen**
**Smyrilsvegur 8**
**Postboks 182**
**FO 110 Tórshavn**



Meiri fæst at vita við at ringja til Arthur Poulsen á tlf. 312 000 Ella send ein mail á ap@mp.fo

**pf Maria Poulsen**
Box 182 · FO-110 Tórshavn

P/F Maria Poulsen er størsta HVS virkið í Føroyum við handli,verkstaði og búnýti. Í dag starvast um 35 fólk í fyritøkuni. Alt innan heilsølu og smásølu.



ÚTBJÓÐING

Elektriskt viðlíkahald

Við hesum verður elektriska viðlíkahaldið av Norðskálatunlinum, Leynatunlinum og Hovstunlinum boðið út í almenna lisitatión.

Viðlíkahaldsavtalan er galdandi í trý ár. Møguleiki er at bjóða upp á viðlíkahaldið av tunlunum samlað og av hvørjum tunli sær.
Fyritøkur, ið vilja bjóða, skulu kunna vísa á neyðugan førleika til at gera arbeiðið til lítar. Metingarstøðið verður greinað í útbjóðingarskrivinum til tilboðsgevararnar.

Lisitatión verður á Landsverki, Tinghúsvegi 5, Tórshavn, **mánadagin 14. mars 2011 kl. 13.00.**

Talgilt útbjóðingartilfar kann bíleggjast frá Landsverki frá **mánadegnum 24. januar 2011 á dila@lv.fo og á 340 800.**

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, 110 Tórshavn | Tel. 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

*Landsverk er stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvøllir, herundir tyrlupallar.*